


Nao Storm kann hjálpa flóttafólkum umgangandi, sigur eigarin. Mynd: Nordic American Offshore

# Norskt reiðarí bjóðar sær at bjarga flóttafólkum við spildurnýggjum skipi

**Flóttafólk**



**Vil hýsa 1000 flóttafólkum - vit kunnu ikki bíða eftir politikkarunum**

08:16



**Eingin ES-loysn á flóttafólkatrupulleikanum**

09:31



**Bátssjólátini av flóttafólkum hækkar**

20:46



**Red Barnet: Húðarliturin kann avgera lagnuna hjá flóttafólkum**

18:28

**» Fleiri**

**Jógvan Hugo Gardar**

22.04.2015 - 15:55

Oljan.fo

Meðan norsk sjófólk hava bjóða seg fram til at fara til Miðalhavið at hjálpa til, við at forða fyri fleiri flóttafólkavanlukkum í vár, so hevur borgarliga stjórnin sagt at einki kann gerast fyrrenn 1. august. Men seinnapartin bakkaði stjórnin, aftaná at allir politisku flokkarnir hittust á Stórtingum fyri at tosa um støðuna í Miðalhavinum, har flóttafólkakreppan versnar fyri hvønn dag.

Nú sigur norska stjórnin at sivil skip skulu sendast til Miðalhavið so skjótt sum til ber. Og tað verður ikki trupult at finna reiðaríir sum vilja lata skip fara til hesar uppgávurnar.

Nordic American Offshore hevur, sambært maritime.no og NRK, bjóða fram at senda sítt nýggjasta frálandaskip, Nao Storm, avstað. Nógv frálandaskip eru serútgjørd, og eru vælegnaði til at bjarga fólki.

- Vit eiga tíggju supply-skip, spildurnýggj og bygd í Noregi, og tey kunnu hvørt sær taka ímóti eini 2-300 persónum. Eitt av teimum er serútgjørt til bjarginarstøður, og vit hava eisini eitt sum kann sendast av stað um fáar dagar fyri ein rímiligan penga, sigur nevndarformaðurin í Nordic American Offshore, Herbjørn Hansson.

Eisini norska reiðarafelagið hevur heitt á norsku stjórnina um at arbeiða skjótari, tí sambært teimum upplýsningunum felagið hevur fingið frá sínum limum, so er vilji til at hjálpa, og semja er um at hjálpin kann sendast beinanvegin